# FISKIMÁLASTÝRIÐ
FISKIVINNUSTOVAN

Tórshavn, tann 22. juni 2001
J.Nr.: 20000342-31 / 140
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: AK/el

Tygara skriv

Løgtingið
Landsstýrismálanevndin
Postrúm 208
110 Tórshavn

Víst verður til skriv tykkara til Jørgen Niclasen, landsstýrismann dagfest 9. mai 2001 – tykkara j. nr. 7.13.20000003[19]ks/td – har biðið verður um upplýsingar viðvíkjandi ávísum viðurskiftum í sambandi við, at útlendsk skip hava fingið loyvi at fiska tunfisk í føroyskum sjógvi.

Í hesum sambandi skal verða sagt frá, at Fiskimálastýrið hevur fingið hjálagda skriv frá Faroe Seafood Prime, Tórshavn sum svar upp á fyrispurningin frá landsstýrismálanevndini.

Svarið frá Faroe Seafood Prime verður hervið sent landsstýrismálanevndini.

Vinarlig heilsan

Andras Kristiansen

A. Kristiansen

25. JUN. 2001

Løgtingið j. nr.
7.13-20000003

NOATÚN... VIÐ STROND 17 - 19 • POSTSMOGA 347 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 30 30 • TELEFAX 35 30 35
E-MAIL: FISK@FISK.FL.FO

FAROE SEAFOOD

Fiskimálastýrið
Fiskivinnustovan
Postsmoga 347
110 Tórshavn
**Att.: Andras Kristiansen**

Date: 28. mai 2001
Our ref:

SALES OFFICES
Faroe Seafood Hirtshals Branch
Faroe Seafood UK Limited
Faroe France S.A.
FACTORING COMPANY
Faroe Seafood Finance A/S

**J. nr. 20000342-23/140**

Víst verður til skriv dagfest 15. mai 2001 frá Fiskimálastýrinum.

Í 1997 søkti Fiskasølan fyrstu ferð um loyvi til í samstarvi við japanar at reka royndarveiðu eftir tunfiski í føroyskum øki. Okkara ætlan var at nýta føroysk skip til henda fiskiskap, men m.a. tí føroyingar ikki høvdu hóskandi skip til hesa veiðu, varð hetta av ongum. Føroya Landsstýri játtaði okkum royndarveiðiloyvi í samstarvi við japanar, og samstarv varð fingið í lag við eitt japanskt felag. Samstarvið varð, sum áður upplýst fyri Fiskimálastýrinum, grundað á ta vitan, sum japanar høvdu í sambandi við veiðu og sølu av tunfiski, og endamálið hjá Fiskasøluni við luttøku í hesum samstarvi var at ogna felagnum vitan á hesum umráði.

Í royndarveiðiloyvinum frá Fiskirannsóknarstovuni varð ásett, at veiðan skuldi fara fram í samstarvi við útlendskt felag. Eisini vóru ávísar treytir ásettar í loyvinum, t.d. treytir um føroyskan eygleiðara, útvegan av vísindaligum upplýsingum, gjald til Fiskirannsóknarstovuna fyri m.a. eygleiðarar, o.s.fr.

Fiskasølan hevur hildið allar treytir, ið ásettar vóru í royndarveiðiloyvunum og álagdar okkum av Føroya Landsstýri og Fiskirannsóknarstovuni. Vit meta tí ikki orsøk vera at lata Fiskimálastýrinum upplýsingar, sum ikki viðvíkja teimum játtaðu royndarveiðiloyvunum.

Vinarliga
FAROE SEAFOOD P/F

p. Hans Johannes á Brúgv

FISKIMÁLASTÝRIÐ
- 1 JUN. 2001
J. NR. 20000342-30/140

**FAROE SEAFOOD PRIME P/F**
P.O. Box 68 FO-110 Tórshavn Faroe Islands Reg. No. P/F 2452
Telephone +298 345 345 Telefax +298 345 300 E-mail: faroe@faroe.com http://www.faroe.com
Bankers · P/F Føroya Banki · Den Danske Bank A/S · Unibank A/S